## Kanska grøv Kleopatru

Fyri 2039 árum síðani doyði tann navnframa egyptiska drotningin Kleopatra, og nú bendir okkurt á, at fornfrøðingar hava funnið grøv hennara. Við serligari radaraútgerð hava fornfrøðingarnir leitað í templinum Taposiris Magna, og kanningarnar haqva avdúkað trý pláss, har Kleopatra kann verða jarðsett. Egyptisku fornfrøðingarnir hava longu funnið eina standmynd av teirri kendu drotningini og 22 gullmyntir við andliti hennara á. Fornfrøðingarnir siga, at Kleopatra er avmyndað sum ein vøkur kvinna.

## Reykjavík stórt hall

Tórshavnar kommuna er ikki tann einasta høvuðsstaðarkommunan á okkara leiðum, sum hevði hall á roknskapinum í fjør. Morgunblaðið visti í gjár at siga, at Reykjavíkar kommuna hevði meiri enn 71 milliardir íslendskar krónur í halli í 2008. Sambært blaðnum var hallið munandi størri enn ætlað. Reykjavík skyldar eisini væl meiri enn fyri hálvum øðrum ári síðani, tí í fjør vaks langtíðarskuldin hjá býnum úr 114 í 231 milliardir íslendskar krónur. Morgunblaðið skrivar, at ovurstórt hall hjá orkufelagnum Orkuveita Reykjavíkur var høvuðsorsøkin til tað stóra hallið hjá íslendsku høvuðsstaðarkommuni í 2008.



# Eitt skifti í grønlendskum politikki

**IA bleiv sum væntað tann stóri sigursharrin á grønlendska landstingsvalinum í gjár, og valsigurin fer eftir øllum at døma at elva til eitt skifti í grønlendskum politikki**

VAL Í GRØNLANDI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Kupiik Kleist, eisini kallaður tann grønlendski Leonard Cohen, skal nú royna st skipa samgongu*
*Mynd: Polfoto*

Tað gekk sum væntað á grønlendska landstingsvalinum í gjár. Tann seinasta veljarakanningin segði, at IA fór at fáa umleið 44 prosent av atkvøðunum, og tá uppteljingin var liðug í nátt, hevði flokkurin fingið 43,7 prosent. Tað er ein framgongd upp á 23,3 prosentstig samanborið við valið í 2005. Tað stóra atkvøðutalið gevur IA 14 av teimum 31 tinglimunum.

Siumut fekk 26,5 prosent av atkvøðunum ella 3,9 prosentstig minni enn seinast. Flokkkurin fær níggju umboð í Landstingið.

Atassut fekk 10,9 prosent, sum var heili 8,1 prosentstig minni enn í 2005 og tríggjar tinglimir, og Demokratarnir fingu 12,9 prosent, sum var 9,9 prosentstig minni enn í 2005. Flokkurin hevur nú fýra tinglimir.

Katusseqatigiit Partiiat ella Kandidatflokkurin slapp júst upp um minstamarkið við 3,9 prosentum og fekk ein tinglim, meðan Sorlaat Partiiat bleiv ov stuttur við 1,3 prosenti.

71,3 prosent av teimum grønlendsku veljarunum vóru á vali í gjár.

### Uttan um Siumut

Tað tykist greitt, at valúrslitið fer at elva til eitt skifti í grønlendskum landspolitikki, tí formaðurin í IA, Kuupik Kleist, hevur sagt, at flokkurin fer ikki í samgongu saman við Siumut aftan á valið. Heldur hann orð, og hugsar flokkurin sum hann, er tað sannlíkt, at Siumut noyðist í andstøðu eftir at hava sitið við valdið síðani 1979.

-So leingi eg eri formaður í IA, fer flokkurin ikki í samgongu við Siumut, segði Kuupik Kleist, eftir at uppteljingin var liðug í nátt. Hann vildi ikki siga, hvat flokkurin so ger, men segði tó, at hann er sinnaður at samstarva við øll burtursæð frá Siumut.

- Okkara mál er framvegis at fáa eitt so breitt samstarv sum gjørligt í Landstinginum. Valdið skal býtast sundur, og tí fær andstøðan eisini ábyrgd, segði IA-formaðurin við KNR í nátt. Hann segði seg vænta, at ein samgonga verður greið innan átta dagar.

### Hans Enoksen tapti

Einav persónsuppgerðunum á landstingsvalinum í gjár var ímillum Hans Enoksen, formann í Soiumut og landsstýrisformann og floksfelagan Alequ Hammond, fyrrverandi landsstýriskvinnu í fíggjarmálum.

Dysturin teirra millum byrjaði undir valstríðnum, tá Aleqa Hammond bjóðaði sínum formanni av bæði sum floksformanni og landsstýrisformanni. Veljararnir hildu eftir øllum at døma við henni, tí á valinum í gjár fekk Aleqa Hammond 1.033 persónligar atkvøður, meðan Hans Enoksen fekk 1.002.

Tað merkir, at Hans Enoksen misti helvtina av sínum atkvøðum samanborið við valið í 2005, samstundis sum Aleqa Hammond tvífaldaði sítt atkvøðutal, og í nátt segði formaðurin, at hann er til reiðar at fara frá, um flokkurin vil hava annað fólk í hansara stað.



*Hans Enoksen hevur verið landsstýrisformaður í sjey ár, men noyðist ætlandi frá eftir ósigurin í gjár*
*Mynd: Polfoto*

### IA meirilutan í Nuuk

Úrslitini úr teimum einstøku valstøðunum vístu, at IA fór at fáa eitt sera gott val, og tá uppteljingin í Nuuk var liðug, var tað greitt, at talan var um ein veruligan stórsigur.

IA fekk ikki færri enn 52 prosent av øllum atkvøðunum í Nuuk og sostatt meiri enn helmingin av atkvøðunum. Framgongdin í høvuðsstaðnum var heili 24,9 prosentstig, og tølini hjá hinum flokkunum vístu, at allir høvdu mist veljarar til IA samanborið við valið fyri fýra árum síðani, skrivar Sermitsiaq.

Tann størsti taparin í Nuuk vóru Demokratarnir, sum mistu 15,9 prosentstig. Atassut misti 6,1 prosent, og Siumut 2,9 prosent. Sostatt hevur Siumut nú bara 17,8 prosent av veljarunum í gomlu háborgini.

